# Umsóknarskjal til stovning av breiðbandi frá Hey

- [ ] Stovning
- [ ] Flyting
- [ ] Umskifti
- [ ] Yvirtøka
- [ ] Uppsøgn
- [ ] Broyting
- [ ] IPTV Televarp

## Bíleggingin fevnir um (verður útfylt við spjaldrastavum)

DSL-nummar

Fyrrverandi kundi

Umskifti frá FT DSL

Fyrrverandi bústaður

## Slag av haldi (set X)

- [ ] 5/0,5 Mbit -395 kr/mán (flatrate)
- [ ] 10/1 Mbit – 449 kr/mán (flatrate)
- [ ] 20/5 Mbit – 456 kr/mán (flatrate)
- [ ] 40/5 Mbit – 476 kr/mán (flatrate)
- [ ] 50/10 Mbit – 486 kr/mán (flatrate)
- [ ] 75/10 Mbit – 496 kr/mán (flatrate)
- [ ] 100/20 Mbit – 529 kr/mán (flatrate)
- [ ] **Bonding**
- [ ] **Summarhús hald** 25 kr/dagin (u/linjugjald)

Afturat hesum kemur linjugjald á kr. 87,50, um einki fastnet er frammanundan í sama navni, sum breiðbandið, og møguligt eyka linjugjald á kr. 27,50..

## Tilknýti til aðrar tænastur

Eg standi fyri fastnethaldi? - [ ] Ja - [ ] Nei

Hevur breiðband verið fyrr? - [ ] Ja - [ ] Nei

Skal montørur út? - [ ] Ja - [ ] Nei

Fastnettelefonnummar

[1] Hugsast skal um, hvat møguligt undirnummar/eykanummar verður nýtt til t.d faks

## Kundaupplýsingar

Slag av kunda

- [ ] Privatkundi
- [ ] Vinnukundi
- [ ] P/f
- [ ] Sp/f
- [ ] K/f
- [ ] P/r
- [ ] L/f

Annað: ______________

Navn / Fyritøka

Bústaður / Postrúm

Postnummar

Bygd/Býur

Føðingardagur / V-tal

Teldupostadressa

Matrikkulnr.

Annað hald, sum skal flytast við

Dato tá flyting ynskist sett í verk (Bert útfyllast, tá talan er um flyting)

d d m m á á

Fastnettelefonnummar

Kontaktnr.

Kontaktnr.

## Gjaldaraupplýsingar (Skal bert fyllast út, um gjaldarin er annar enn kundin)

Navn / Fyritøka

Bústaður / Postrúm

Postnummar

Bygd/Býur

Føðingardagur / V-tal

Teldupostadressa

Telefonnummar

Kontaktnr.

- [ ] Ja, eg havi lisið viðskiftatreytirnar
- [ ] Eg ynski at frætta frá Hey, tá serlig tilboð eru

## Kontonummar til Gjaldsskipan

Skrásetingarnummar

Kontonummar

*Um tú ikki hevur GS, verður rokningsgjald álagt.

- [ ] Ynskir tú rokning - 49 kr/mðr
- [ ] Ynskir tú at tilmelda Sjálvvirkandi kortgjalding - 0,-
- [ ] Ynskir tú at tilmelda Betalingsservice gjaldsavtalu - 9,75 kr/mðr

Dagfesting

Undirskrift

Er felagin yngri enn 18 ár, skal foreldur ella verji skriva undir

Viðmerkingar:

## Innanhýsis skráseting hjá Hey

Dagfesting

Sølufólk

Kundanummar

# Vegleiðing til stovning av breiðbandi frá Hey



**Viðskiftatreytir**
Hesin teigur greiðir frá viðskiftatreytum fyri Breiðband privat, galdandi frá
1. september 2005.

**Gildisøki**
Hesar viðskiftatreytir eru galdandi fyri Breiðband privat. Hesar viðskiftatreytir eru sertreytir í mun til almennu viðskiftatreytirnar hjá Hey. Er ósamsvar millum hesar viðskiftatreytir og almennu viðskiftatreytirnar, eru tað hesar, sum eru galdandi. Har einki verður nevnt í hesum treytum, eru almennu viðskiftatreytirnar galdandi.

**Breiðband**
Við breiðbandi frá Hey fært tú eitt hald við fríari nýtslu upp til eitt ávíst loft.

**Treytir**
Hey skilar sær rætt til at skerja linjukapasitet fyri einstakar ella fleiri kundar við hátyngd. Hey skilar sær rætt til at raðfesta og seta filtur á ferðsluinnihald, sum kann verða avmarkaðandi fyri tænastuna.

Hey kann ikki tryggja, at áljóðandi linjukapasitetur til tín kann nýtast til fulnar á internetinum. Hey kann heldur ikki tryggja, at tú altíð hevur samband við hægst møguligari ferð.

Víðarisøla av øllum ella pørtum av haldinum er ikki loyvd. Rættindini til haldið falla aftur til Hey, tá haldið verður uppsagt, herímillum møgulig IP-adressa.

Hey hevur rætt til at broyta IP-adressur. Hey hevur ikki ábyrgd av teimum upplýsingum, sum eru tøkar hjá tær í sambandi við atgongd til internetið, herímillum heimasíður, teldubrøv, tíðindabólkar og kjattbólkar.

Hey hevur ikki ábyrgd av tí dátamissi, sum internetið kann hava við sær, herímillum dátamissur í sambandi við virusfongdan tólbúnað og ritbúnað. Um tú ikki hevur fastnet, skalt tú rinda fyri kopargjald av breiðbandslinjuni. Um brúkarin er annar enn tú, (sí teig 3 í oyðublaðnum), og brúkarin ikki hevur fastnet, verður brúkarin álagdur eitt kopargjald.

Tað áliggur brúkaranum at upplýsa Hey um broytingar á hesum øki. Bæði um tú/brúkarin fær fastnet, ella um fastnetið verður uppsagt ella niðurlagt á annan hátt.

**Feilmelding**
MIðað verður ímóti, at feilrætting er byrjað innan 12 arbeiðstímar frá tí, at Hey hevur móttikið eina feilmelding frá kundanum. Arbeiðstíðin er frá 8.00 til 16.00 gerandisdagar.

**Broytingar**
Broytingar, ið sum heild eru til fyrimuns fyri teg, kunnu setast í verk beinavegin og uttan aðra ávaring frammanundan. Aðrar broytingar kunnu setast í verk við minst 1 mánaðar ávaring til eitt mánaðarskifti.

**Uppsøgn og mishald**
Tú kanst broyta ella uppsiga haldið við 10 arbeiðsdaga ávaring til eitt mánaðarskifti. Hey kann uppsiga haldið við 1 mánaða ávaring. Verður haldið mishildið, kann tað verða uppsagt sambært almennu viðskiftatreytunum.

**Avmarkingar**
Breiðband kann bert veitast á støðum, har samskiftiskervið er útbygt við ADSL, og har linjulongd og góðska annars eru nøktandi til tænastuna.

**Almenn viðurskifti**
Hesin teigur vegleiðir teg um, hvussu tú fyllir út umsóknarskjalið til stovning av breiðbandi frá Hey. Viðvíkjandi prísum verður víst til hey.fo.

Er umsóknarskjalið ikki rætt útfylt, skilar Hey sær rætt til ikki at stovna haldið, fyrr enn neyðugu upplýsingarnar eru tøkar. Stovningin er bindandi, tá ið umsóknarskjalið er undirskrivað ella 14 dagar eftir móttøku av ordraváttan.

**1. Bíleggingin fevnir um**
Set kross. Tá talan er um stovning útfyllir Hey dsl nr. teigarnar.

**2. Kundaupplýsingar**
Tú stendur fyri og hevur alla ábyrgdina av haldinum. Fyll út teigarnar við fornavni, eftirnavni, føðingardegi, bústaði og matr.nr.
Um tú longu ert viðskiftafólk hjá Hey, skal kundanummarið eisini skrivast (stendur í telefonrokningini).

**3. Brúkari (íbindingarstað)**
Skal fyllast út, um brúkarin er annar enn tú.

**4. Tilknýti til aðrar tænastur**
Tú skalt upplýsa, um tú stendur fyri einum fastnethaldi. Er talan um, at brúkarin er ein annar enn tú, verður upplýst, um brúkarin stendur fyri fastnethaldi. Um ikki, verður brúkarin álagdur eitt eykagjald fyri koparlinjuna.

Um tú/brúkarin hevur fastnethald, og hetta er ISDN, skal eisini upplýsast, um ynskt verður at skifta haldið um við vanligt telefonhald. Atlit skal takast til, um tú brúkar eykanummar ella undirnummar til neyðugar funktiónir, t.d. faks ella líknandi. Í ávísum førum kann talan verða um neyðugt umskifti, t.d. um linjumangul er. Í hesum føri verður einki umskiftisgjald goldið. Er talan um vanligt umskifti frá ISDN til PSTN í sambandi við breiðbandsstovnan, rindar tú eitt umskiftisgjald.

Hevur tú/brúkarin eitt ADSL breiðbandssamband frammanundan, er meginreglan tann, at ikki ber til at bíleggja, fyrr enn sambandið er uppsagt.

**5. Tænastan**
Linjuferðin er upplýst sum inngangandi/útgangandi ferðsla. Inngangandi ferðla er linjuferðin frá samskiftisnetinum hjá Hey til kundan. Útgangandi ferðslan er linjuferðin frá tínum til samskiftisnetið hjá Hey.

**6. Viðmerkingar**
Hevur tú viðmerkingar til Hey, skulu tær skrivast her. Søkir tú um flyting, skal gamli bústaðurin skrivast undir viðmerkingunum.